

» eg haldi, at tað hevur bara verið ein fyrimunur at lækka prísirnar til festivalin
VINJARD JOHANSEN

















aftur í fyrra helmingin av juni mánaða næsta ár.

- Vit fara við góðum treysti undir at fyrireika festivalin, sum verður aftur næsta ár, og hesar fyrireikingar eru longu byrjaðar.

Vinjard Johansen vísir á, at hóast tíðirnar og umstøðurnar hjá fólki eru broyttar, hongur fjarðafestivalurin saman fíggjarliga.

- Tá vit skipaðu fyri festivalinum á fyrsta sinni, var prísurin fyri tiltakið 795 krónur, meðan prísurin í ár og í fjør hevur verið 395 krónur. Hetta hava vit gjørt fyri at gera tað møguligt hjá familjum at koma til tiltøkini. Børn undir 11 ár hava havt ókeypis atgongd, eins og allir aktivitetirnir í fjarðalandinum vóru ókeypis, sigur hann.

## Neyðug tillaging

Hann sigur, at neyðugt hevur verið at tillagað prísirnir til broyttu fíggjarligu umstøðurnar hjá fólki, og hann heldur, at hetta hevur verið viðvirkandi til, at tað eydnaðist at fáa so nógv fólk á festivalin aftur í ár.

- Eg haldi, at tað hevur bara verið ein fyrimunur við at lækka prísirnar, sigur Vinjard Johansen, stjóri í fjarðafestivalinum.

*vilmund@sosialurin.fo*